# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fimleikurin nærkast

**Hóast fimleikur ikki er ein av ítróttargreinunum á oyggjaleikunum á Rhodos, verða føroysku fimleikararnir ikki við sviðusoð. Tey fara nevniliga at kappast á fimleikaoyggjaleikunum, sum verða á Isle of Man 16.-20. juli**

OYGGJALEIKIR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Í fimleikahallunum í Havn og Runavík hevur nógv virksemi verið seinastu tíðina, hóast fimleikaárið hjá teimum flestu er liðugt. Saman við tveimum landsliðsvenjarum eru tilsamans 11 fimleikarar í ferð við fyrireikingarnar til fimleikaoyggjaleikirnar, sum verða á Isle of Man um stutta tíð. Fimleikararnir venja umleið tríggjar tímar hvørja ferð, fimm ferðir um vikuna. Landsliðsvenjararnir eita Durita Knudsen og Eyvind Akraberg Hansen, og tey eru sera spent at fara avstað.

## Ætla at skriva søgu

-Vit hava sera góðar vónir til menninar, sigur Eyvind Akraberg Hansen. Til seinastu oyggjaleikirnar vunnu vit nógv heiðursmerki, og í ár ætla vit okkum at skriva føroyska fimleikasøgu og vinna liðkappingina hjá monnunum fyri fyrstu ferð. Harafturat hava vit eisini góðar vónir til hinar kappingarnar. Hjá kvinnunum hava Bermuda seinastu árini verið ótrúliga sterkar sammet við hini londini, so tað verður kanska torført at gera nakað við tær, men vit hava serliga góðar vónir til bundnu kappingina, sum vit halda okkum kunna vinna, leggur Eyvind Akraberg Hansen afturat.

## Landsliðini tikin út

Tilsamans 11 fimleikarar manna landsliðið, sum skal til Isle of Man – fimm á manslandsliðnum og seks á kvinnulandsliðnum. Fimleikararnir eru úr Havnar Fimleikafelag, Ljósinum og Støkk.

Liðini, sum føroysku fimleikararnir fara at kappast ímóti, eru m.a. frá Isle of Man, Jersey, Ynes Mon, Bermuda og Álandi.

Tilsamans 15 fólk verða í føroyska ferðaliðinum. 11 fimleikarar, tveir venjarar, ein fysioterapeutur og ein ferðaleiðari. Føroysku fimleikararnir fara avstað 13. juli og verða heima aftur 21. juli.



*Føroyska manslandsliðið: frá vinstru: Rósing Dam (HF), Fróði Mortensen (HF), Gutti Harryson (HF), Høgni Øster (HF) og Kristian í Lon Olsen (Støkk). Kristian var við í bruttohópinum, men verður ikki við til kappingarnar. Á myndini vantar Øssur D. Eiriksfoss (HF)*



*Føroyska kvinnulandsliðið: frá vinstru: Brim H. Hoydal (Ljósið), Elinborg T. Durhuus (Ljósið), Anita Knudsen (Støkk), Silja Højgaard (Støkk), Kristina Toftegaard (Støkk) og Sonja Joensen (Støkk)*

# KÍ spælir fyri sínum møguleika

**Men eingin ivi er millum klaksvíkingar um, at tað fyrst og fremst snýr seg um landskappingardystin ímóti AB næsta mikukvøld**

KÍ INTERTOTO
*Jóannes Hansen*

Í morgin klokkan 16 fer KÍ fyri fyrstu ferð nakrantíð at spæla heimadyst í Intertoto Cup kappingini. Uppgerðin verður á Svangaskarði ímóti svenska Hamarby, sum leygardagin á heimavølli vann 1-0 á KÍ.

- Vit fara at spæla fyri okkara møguleika. Men vit fara ikki at leypa á við nógvum fólki frammarlaga á vøllinum. Orsøkin til lutfalsliga góða úrslitið í Stokholm var, at vit løgu aftarlaga og syrgdu fyri, at leikferðin ongantíð gjørdist høg. Tað verður umleið sama uppskriftin á heimavølli, sigur KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

Hóskvøldið vandi KÍ á Svangaskarði. Liðið tykist fara at síggja umleið soleiðis út í morgin, sum tað gjørdi í síðstu viku. Einasta broytingin tykist verða, at Kaj Ennigarð, sum leingi hevur verið skaddur, men sum seinastu vikurnar hevur fingið eitt sindur av dystarvenjing, hesa ferð verður í miðverjuni saman við Jan Andreasen.

- Vit taka hetta sum eina uppliving. Tað skal ganga ógvuliga væl, um vit skulu megna at spæla okkum í asnnað umfar. Sjálvandi savna vit okkum um hesa uppgávuna. Men tað er eingin ivi um, at vit hugsa nógv um landskappingardystin, sum mikukvøldið verður á heimavølli ímóti AB. Hann fer at hava ógvuliga stóran týdning fyri bæði AB og okkum, sigur Eyðun Klakstein.

Ein av ungu KÍ spælarunum, Oddmar á Lakjuni, fór týskvøldið til skips við Skálabergi. Tað vil siga, at hann verður ikki at síggja á vøllinum nógvu næstu vikurnar.

Mikukvøldið vann Hamarby landskappingardyst á heimavølli 3-1 ímóti IFK Göteborg. Teir í Hamarby vóru ógvuliga væl nøgdir við avrikið í 1. hálvleiki, sum endaði 3-0.

Tað er greitt, at Charlie Davies, sum leygardagin var einsamallur málskjútti, tá ið KðÍ var í Svøríki, ikki verður á liðnum hjá Hamarby í morgin. Hann er úttkin at spæla á landsliðnum hjá USA, sum í hesum døgum er við í Copa America. USA er í bólki saman við Argentina, Kolombia og Paraguay.

## Andrew aftur í HB

Eftir hálvt fjórða ár í Fremad Amager, vendir Andrew av Fløtum nú aftur til barndómsfelagið HB. HB boðaði í gjár frá, at felagið hevur skrivað undir sáttmála við Andrew av Fløtum. Sáttmálin hjá føroyska landsliðsleikaranum er galdandi kappingarárið út. Hetta er gjørt greitt, eftir at nógvar gitingar hava verið um komandi felagið hjá Andrew. Sjálvur segði Andrew við Sosialin í vár, at rætta tilboðið avgjørdi framtíð hansara.

## Jónas og AB skrivað sáttmála

AB og Jónas Tór Næs skrivaðu í gjárkvøldið undir sáttmála, sum bindur partarnar fyri restina av hesum kappingarárinum. 20 ára gamli Jónas Tór Næs hevur seinasta hálva árið spælt við Fremad Amager. Heimasíðan hjá AB sigur soleiðis um Jónas. - Hann trívist best á høgru síðu, men kann eisini umstillast til at spæla í hinum borinum.